## Hvør fann Grønland?

Nakrir granskarar á lærda háskúlanum í Keypmannahavn hava nú sett sær fyri at kanna, hvat tað vóru fyri fólk, sum komu til Grønlands sum tey fyrstu. Við hjálp frá DNA-royndum ætla granskararnir at staðfesta, hvaðan tey fyrstu fólkini í Grønlandi komu. Hildið verður, at fólk hava búð í Grønlandi í fleiri tíðarbilum, men at veðurlagið hevur gjørt tað ómøguligt hjá fólki at støðast har. Tey fyrstu komu helst fyri umleið 4500 árum síðani.



## USA konsulát í Nuuk

Á einum fundi við grønlendska landssýrismannin í uttanríkismálum, Aleqa Hammond, í síðstu viku boðaði amerikanski sendiharrin í Keypmannahavn, James Cain, frá, at USA vil sleppa at lata eitt konsulát upp í Grønlandi. Aleqa Hammond sigur, at málið verður tikið upp á fundi, sum hon og Condoleezza Rice, uttanríkiaráðharri, fara at hava í mai næsta ár. Ætlandi verður amerikanska konsulátið í Nuuk bara opið um summarið, sigur KNR.

*Vest Pack í Vestmanna er heildarveitari av pakkitilfari til fiskaframleiðslu og matvøruídnaðin annars. Á virkinum arbeiða eini 18 fólk*

*Mynd: Vest Pack*



# Vest Pack leitar vestur um hav

**Íslendski marknaðurin er nógv størri enn hin føroyski, og tí síggja tey, sum standa fyri rakstrinum av Vest Pack, stórar møguleikar í einum samstarvi við íslendskan veitara og keypara**

ÍDNAÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vest Pack í Vestmanna arbeiðir í løtuni við at fáa í lag samstarv við felag í Íslandi, ið ætlandi kemur at keypa vørur, sum virkið framleiðir. Íslendska felagið er ikki framleiðari, men veitari av ymiskum vørum úr USA og Evropu, sum eitt nú fiskivinnan keypir.

### Styrkt grundarlag

Ætlaða samstarvið vestur um hav kemur soleiðis at veksa um marknaðin av teimum vørum, sum verða framleiddar í Vestmanna, samstundis sum Vest Pack kemur at umboða vørur í Føroyum, sum íslendska felagið hevur í síni vøruskrá.

Á Vest Pack arbeiða eini 18 fólk. Stjóri er Jóan Magnus Olsen, og sølufólkini eru Áki Olsen og Thomas Thomsen.

Tað er Havnar Timburhandil, sum eigur virkið í Vestmanna.

Jóan Magnus hevur starvast øll árini hjá Vest Pack, síðan felagið varð stovnað á heysti 1994, og hann byrjaði á virkinum sum maskinmaður. Áki Olsen og Thomas Thomsen hava arbeitt hjá felagnum í ávikavist 11 og 9 ár. Teir eru soleiðis allir gamlir í garði, sum vit plaga at siga.

### Veitari til ídnaðin

Høvuðsvirkisøkið hjá felagnum í Vestmanna er framleiðsla av plasti og etikettum, men felagið hevur seinastu árini eisini verið heildarveitari av pakkitilfari til eitt nú fiskavirkisvinnuna og annan matvøruídnað í Føroyum.

Umsetningurin av teimum vørum, sum felagið umboðar úr útlandinum, hevur verið støðugt veksandi í mun til sjálva framleiðsluna á virkinum, men framvegis stavar umleið helmingurin av umsetninginum frá egnari framleiðslu.

Ein liður í at veksa um framleiðslupartin er samstarvið, sum felagið nú arbeiðir við at fáa í lag við íslendska felagið.

Íslendski marknaðurin er nógv størri enn hin føroyski, og tí síggja tey, sum standa fyri rakstrinum av Vest Pack stórar møguleikar í hesum samstarvi.

### Tillaga framleiðsluna

Styrkin hjá Vest Pack í Vestmanna er, at felagið við at hava egna framleiðslu kann tillaga hesa eftir tørvinum á føroyska marknaðinum. Soleiðis kann felagið eisini veita eina minni nøgd av síni serframleiðslu til síni viðskiftafólk enn eitt nú kappingarneytarnir uttanlands kunnu.

Vest Pack er ISO 9001 góðkent, og tað er framleiðslan á virkinum eisini.

# Klakkur hálva miljón fyri 40.000 pund



*Ísfiskatrolararnir Fjalshamar og Nónhamar landaðu í gjár, og í morgun landaði línuskipið Fugltúgvan, sum liggur innast við Kósabrúnna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Tá ið línuskipið Grani hevur landað á Kósini í morgin, verður neyvan nøkur landing aftur fyrr enn í fyrsta lagi triðja jóladag**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið Klakkur hevur aftur gjørt ein góðan túr – ikki í nøgd, men í avreiðingarvirði. Skipið landaði í Klaksvík í gjár. Veiðan var 40.000 pund, sum teir høvdu fiskað á Íslandsrygginum. Meginparturin av veiðini var toskur, og fyri hesi 40.000 pundini fingu teir eina hálva miljón krónur. Miðalprísurin fyri lastina var 25,52 krónur fyri kilo.

Tað er góður fiskaprísur. Men tað eru ikki allir, sum hava fingið slíkan prís seinastu dagarnar fyri høgtíðina.

Ein útróðrarbátur var á uppboðssøluni í morgun. Besti prísur, teir fingu, var 12 krónur kilo fyri besta fiskin. Tær næstu fiskastøddirnar góvu ávikavist 11 og 10 krónur fyri kilo, meðan smæsta hýsan, hýsa 4, fór fyri 4 krónur fyri kilo.

### Grani seinastur

Skipini, sum Landingarmiðstøðin hevur landað í Klaksvík hesa vikuna, eru Safir og Smaragd 140.000 pund, Fjalshamar og Nónhamar 80.000 pund og Navarin og Borgarin, sum vóru fullir undir lúkurnar, høvdu 260.000 pund.

Í morgun hevur línuskipið Fugltúgvan landað í Klaksvík. Teir høvdu eini 50.000 pund, sum Kósin keypti.

Seinasti bátur, sum Landingarmiðstøðin veit um fyri jólahøgtíðina, er línuskipið Grani, sum kemur inn at landa í morgin.

Línuskipið Helena er framvegis til fiskiskap, og ætlandi koma teir inn jólaaftan og landa triðja jóladag, um teir ikki velja at fara av landinum við veiðini.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík vænta tey, at friður verður fram til triðja jóladag, tá ið veiðan hjá Grana er komin upp í morgin.

– Annars er tað soleiðis, at vit arbeiða, tá ið nøkur landing er, men vanligt er ikki, at arbeitt verður halgidagar. Tí verður okkara fyrsti dagur aftur triðja dag, um nøkur landing verður tá, siga tey á Landingarmiðstøðini.